VALGREINAR

# Hví sleit Tjóðveldisflokkurin samgonguna

**Jógvan við Keldu**
*løgtingsmaður og valevni á Lista A*



Hesi báðir ikki serliga royndu politikarar ræddust, nú búskapargongdin tykist venda, ella í besta lagi at standa í stað.

Helst er tað bara Høgni Hoydal, Kristina Háfoss og onkur tjóðveldismaður, sum livir tætt upp at teimum, sum enn ikki vilja ásanna, at Tjóðveldisflokkurin sleit sjálvstýrissamgonguna.

Føroyingar eiga at leggja sær í geyma, at hesi bæði eru ikki serliga roynd í politikki, og serliga ikki, tá búskaparliga framgongdin steðgar, og kanska gerst til afturgongd.

Týðiliga hoyrist á teimum, at "tað ikki hoyrir heima í einum samfelagi, at afturgongd er, og nýtslan gerst ov stór, tað var bara nakað sum hendi í áttati- og nítiárunum, og skal ikki koma fyri aftur".

**Almenni sekturin veksur "trygt"**

Einki er yvir at dylja, at hesi og fleiri við teimum hava enn ikki fingið við, at tað eru margfaldar kreftir, sum seta kós í einum so lítlum samfelagi sum Føroyar við einum so eintáttaðum vinnulívi. Einki svart/ hvítt. Tíðir kunnu koma, har neyðugt er við ávísum stuðli, fyri at vinnan, eins og tað almenna skal fáa lívbjarga sær.

Tá tað almenna hevur tørv á peningi, játtar politikarin av skattaborgarans peningi, so inntøkur svara til útreiðslurnar. – Almenni sektorurin er støðugur og veksur støðugt, meðan vinnan hevur góð ár fyri síðani aftur at liva undir álvarsligum hóttafalli.

Duettin Høgni og Kristina spyrja: "Ja, men hví hevur vinnan ikki lagt nóg mikið niðurfyri í góðum árum"?

Tey hava ikki spurt seg sjálvi, um góðu árini nú vóru so yvirhonds góð hjá vinnuni.

Hetta er tað, sum Fólkaflokkurin hevur havt at stríðst við nú í sløk seks ár. Hóast alt eru vit komnir fyrimyndarliga væl burtur úr hesum sosialistiska "selskapi".

**Nakrar orsøkir til at tey hoyknaðu**

Ein orsøk til, at hesi ikki orkaðu meira var, at komandi árið ikki verður eins gott og tey farnu. Tí skulu sterkir herðar, og fleiri nýggj átøk setast í verk, sum fara at seta størri krøv til politiska støðið.

Fólkaflokkurin hevur greitt allari tjóðini frá, at neyðugt er at lækka skattin, tí hann er alt ov høgur. – Kanningin seinastu tíðina vísir, at skattaokið í Føroyum er tað tyngsta!

Tjóðveldisflokkurin hevur lagt dent á, at skal skattalætti gevast, skal sami peningur í minsta lagi verða kravdir inn aðrar vegir.

**Fiskurin grundarlagið undir vinnuni**

Fólkaflokkurin góðtekur ikki, at okkara vinna skal gjalda í dýrum dómum fyri eitt fiskiloyvi, tí vit meta, at sjómaðurin og harvið vinnan hevur rættindi til fiskin, og at nóg stríggið er hjá teimum at yvirliva. – Hinvegin verður neyðugt at einfaldgera almennu umsitingina innan vinnuna.

Tjóðveldisflokkurin hevur greitt frá, at ein sokallaður "grønur skattur", tað vil m.a. siga ein eykaskattur leggjast á vinnuna. – Hetta vil Fólkaflokkurin ikki.

Hetta eru í fyrstu syftu bert nøkur fá dømi.

**Tjóðveldið blakaði handklæðið í ringin**

Fólkflokkurin harmast um, sum eg fyrr havi skrivað, at Tjóðveldisflokkurin ikki kláraði at halda út, men sum Jógvan Mørkøre, samfelagsfrøðingur segði, blakaði handklæðið inn í ringin. Tá er liðugt.

Fólkaflokkurin hevur uppiborið eina veruliga uppbakking frá Føroya fólki, og vónandi fáa vit hana til hetta valið. – Latið okkum halda sosialistisku leiðini aftur, við tí leiðslu sum Tjóðveldisflokkurin ídag hevur.

Eg fari tí at heita á føroyingar, her hugsi eg sjálvandi serstakliga um mítt egna valdømi Klaksvíkina og Norðoyggjar, um at fáa eina uppbakking.

Við hesum fari eg at ynskja øllum Føroya fólki eitt gott nýggjár.

# Tryggja framtíð tína

**Jakob Holm**
*valevni Sambandsfloksins*

Nú tá fullveldisskútan hevur kollsiglt og er farin til botns, einaferð með alla, siga vit farvæl til eitt fullveldisævintýr, sum hevur nærum koyrt Føroyska samfelagið á heysin.

Vit muga bróta upp um ermar, enn einaferð, og síggja veruleikan og sannleikan í eyguni.

Uppruddingararbeiðið verdur tungt og krevjandi, men vit hava tikið tøk áður, og eru enn einaferð til reiðar.

Vit í Sambandsflokkinum eru klár við eini heildarætlan, sum hevur nýskipan við sær.

Vit vilja arbeiða fyri at endurnýggja heimastýrisskipanina, varðveita rættarskipanina, og framhaldandi hava somu ríkisborgararættindi. Vit vilja virka fyri, at heilsuverkið og skúlarnir skulu fáa munandi betri sømdir enn tey hava í dag.

Vit mugu heldur ikki gloyma tey gomlu í samfelagnum, (pensionistarnar), sum hava lagt lunnar undir vælferðarsamfelagið, sum fullveldissamgongan í dag nærum hevur forkomið.

Sambandsflokkurin vil framhaldandi arbeiða fyri at tryggja rættindini og vælferðina hjá pensionistunum.

Vit vilja arbeiða fyri betri búskaparviðurskiftum, og betri sosiallóggávu, so vit koma at hava somu sømdir og rættindir sum borgararnir í hinum Norðurlondunum. Hetta vil eisini hava eitt betri og sunnari umhvørvi við sær.

Um tú vilt vera við til at tryggja framtíð tína, so kanst tú gera hetta við at seta X við lista B.

Gott val !

# Nú!

**Hanna Jensen**
*Valevni Fólkafloksins*



Umboð úr mest sum øllum flokkum ilskast nú og tá inn á politisku støðuna í Føroyum. Ikki bert hava vit ta vanligu vinstra-høgra ásina, men eisini loysingsamband ásina. Sum so mong hava ásannað, og sum vit øll hava kent á egnum kroppi, so kann vera sera trupult at skipa samgongu, og ilt er at føra ein miðvísan politik, sum fylgir eini politiskari hugsjón meiri neyvt. Sera nógvar neyðloysnir verða gjørdar, fyri at flokkar, við ymiskum hugsanum eftir aðrari av áðurnevndu ásum, kunnu arbeiða við málum, sum fylgja hinari ásini.

Hetta er ikki nýtt fyri nakran. Loysnin er ikki enn einaferð at tiga málið um ríkisrættarligu støðuna burtur. Skulu vit arbeiða fyri einum sjálvstøðugum Føroyum, so er tað nú! Og einasta haldgóða loysn fyri Føroyar er, at vit avgera og gjalda alt sjálv. Broyting má fara fram, so vit kunnu halda okkum til politik, sum snýr seg um at velja ímillum vinstra og høgra Tí okkara ríkisrættarliga støða er ein blindgøta, tá um politik og menning ræður.

Vit mugu halda áfram at yvirtaka málsøki. Vit mugu fyrireika okkum til at gerast sjálvbjargin á øllum økjum. Stuðulsskipanir eru einki at byggja eina framtíð á. Tað er at kasta ábyrgdina á onnur og at sleppa frælsinum og avgerarrættinum. Heldur ikki kann nakað høpi vera í, at skattgjaldarar í einum øðrum landi skulu gjalda tað, sum restar í, tá vit hava sett okkara livistandard.

Váðaverk? Nei, ikki um vit fara hóvliga og miðvíst fram og syrgja fyri at loysa aðrar samfelagstrupulleikar samstundis.

Ikki seinni, men nú!

# Primer- og secunder mál Miðfloksins

**Jenis av Rana**
*Valevni Miðfloksins*



Greinin er skrivað sum svar til ein, ið ynskir at vita nærri um støðu Miðfloksins til fullveldi (spurningurin sæst á heimasíðu floksins – www.miðflokkurin.fo).

Takk fyri vøkru orð tíni um týdningin av at trúgvandi taka ta ábyrgd av landsins leiðslu, sum vit eru ætlaði at hava. Tilveran er jú ikki tilvildarlig, var tað so, var alt líkamikið. Tvørturímóti hevur Skapari okra tilrættalagt alt út í æsir, m.a. lagt til rættis ætlanir og verk til hvørjari løtu í lívi okkara( hygg t.d. efesus brævið kap. 2 v.10 ). Tí er so umráðandi fyrst av øllum at liva í hesum ætlanum og m.a. bera teimum, vit liva saman við, men eisini samfelagnum sum heild, tað Hann gevur okkum. Hava vit funnið Hann, so hava vit funnið tað besta, og tað mugu vit bera víðari inn í dagliga dag okkara- í skúla, vinnulív, politik v.m. Sjálvandi yvirlata vit ikki leiðslu samfelagsins til tann, sum ikki hevur funnið tað besta- t.e. lívið í Kristusi. Tvørturímóti brúka vit tað, Hann gevur okkum, at skapa og mynda tað samfelag við, sum vit, børn og eftirkomarar okkara annars, skulu liva í!

Viðvíkjandi tjóðskaparpolitikki Miðfloksins, so er hesin ikki nógv útgreinaður í stevnaskrá floksins, sum varð skrivað fyri góðum 10 árum síðani- tvs. áðrenn fullveldiskjakið kom í hæddina. Í løtuni situr ein nevnd og orðar broytingar í stevnuskránni, men m.a. tjóðskaparpolitikkurin hevur ligið greiður seinastu árini, og fari eg at lýsa hann niðanfyri.

Miðflokkurin flokkar politikk sín í primer mál og sekundær mál. Tað primera er, at vit sum tjóð og fólk fyrst av øllum mugu seta álit okra á Guð og Skaparan- síðani kemur alt annað. Tú kanst verða so frælsur, sum tjóð ella einstaklingur, sum tú vera vil, men er tað primera, t.e. viðurskiftini við Harra og Frelsara tín ikki greið, ert tú millum stórstu trælur heimurin veit um at siga. Og tú kanst vera í tí best hugsandi sambandi- við Danir, í ES ella USA, men tó ótryggari og fátækari, enn hugsast kann, hevur tú ikki sett álit títt á Harran Gud. Tá álit títt, mítt og lands okkara er sett á Hann, sum ynskir at sleppa at stýra skapanarverki sínum, fyrst tá eru vit trygg og kunnu fara at skipa viðurskifti okkara( secunder mál okkara) annars- tá á klettfastari grund.

Millum onnur sekunder mál kemur týdningarmikla málið um tjóðarfrælsi- og har hevur flokkurin eina greiða støðu. Vit meta at Skaparin hevur sett okkum í eitt paradís at liva og búleikast . Seta vit álit okkara á Hann, fer aldri, aldri at tróta til dagsins tørv á nøkrum øki! Søkið fyrst ríki Guds… so skal alt hetta verða tykkum givið- er eitt av lyftum hansara til okkum. Sjálvandi skulu vit samstarva við aðrar heimsins tjóðir, og millum tær eru Danmark, Ísland, Grønland og Norðurlond annars sjálvsagdar í fremstu røð. Men tað finst einki haldgott argument fyri, at ein av hesum tjóðum hevur rætt at stýra øðrum, hvusu lítil hendan stýring enn skuldi verði! Vórðu danir rættir demokratar, so høvdu teir fyri langari tíð síðani veitt Føroyum og Grønlandi tjóðarfrælsi, so at hesar tríggjar tjóðir á jøvnum føti kundi havt eitt virðiligt samstarv!

Viðvíkjandi heildarveitingini, sum danir senda okkum á hvørjum ári, eru nú tríggir fyrrverðandi høgtstandandi danskir politikkarar- Krag, Elleman Jensen og Engel, sum geva okkum rætt í, at danir í mong, mong ár hava havt ein stóran fíggjarligan fyrimun av Føroyum. Ein fyrimun so stóran, at ein fíggjarliga uppgerð vildi víst at Føroyar eiga pening til góða hjá dønum, eftir at heildarveitingin( blokkurin) er frároknaður. Tí atkvøddi Miðflokkurin ímóti niðurskurðinum av heildarveitingini og ráddi til at ein fíggjarlig uppgerð fyrst varð gjørd. Sum eina síðstu roynd at forða hesari peningayvirflyting til danir legði flokkurin uppskot fyri Løgtingið um at senda ætlaðu minkanina út til fólkaatkvøðu millum Føroya fólk..

Ein av áheitanum Miðfloksins á hinar føroysku flokkanir, nú val stendur fyri durum, er, at vit saman eiga at biðja um eina fíggjarliga uppgerð við danir Tá hendan fyriliggur verður nógv greiðari og einfaldari hjá fólki at taka støðu til spurningin um tjóðarfrælsi.

Bestu heilsanir og ynski um Signing Harrans.



VALGREINAR

# Betri umstøður til handverkslærlingar!

**Kristoffur Gaardlykke**
*Valevni Javnaðarfloksins í Vágum*



Eftir mínum tykki eru handverkslærlingar lesandi eins og øll onnur lesandi og tí skulu teir eisini hava somu ágóðar. Sum støðan er í løtuni eru handverkslærlingar, sum teir einastu lesandi í Føroyum noyddir at gjalda fullan ferðakostnað. Ferðakostnaður er ein sera tung byrða, hjá einum lærlingi úr útjaðaranum og tí vil eg arbeiða hart fyri, at skipanin við ferðakortum til lesandi, eisini kemur at umfata handverkslærlingar.

Eftir at undanfarna samgonga meldaði út, at endurgjaldið fyri lønarútreiðslur ímeðan lærlingar eru í skúla skuldi avtakast, hava meistarar aftra seg við at taka nýggjar lærlingar inn. Hetta er sera óheppi, tá hugsa verður um, at tørvurin á handverkarum er ovurhonds stórur, og tí meini eg at hetta endurgjaldið skal varðveitast, soleiðis at tilgongdin av handverkarum heldur fram.

Hetta er gjørligt við tínum stuðli á valinum 20. januar!

# Ókeypis fingin fiskiloyvir, gullrandað lummarnar hjá teimum fáu

**Sunleiv Højgaard**
*Valenið fyri Javnaðarflokkin*



Tíðin er komin til at steðga tí spekulatiónini, sum er komin í fiskidagar og loyvir.

Loyvir, sum eru fingin ókeypis skulu brúkast. Sum er, verður í summum føri loyvini ikki brúkt, og seld fyri stórar upphæddir og enda í lummunum hjá teimum heilt fáu.

Vit hava nógvar framúrreiðarar, sum leggja størstu orkuna í at vinna sær, manning og landi valuta.

Spekulatión, har loyvir verða brúkt sum søluvøra ger, at unga ættarliðið hevur rættuliga vánaligar møguleikar at fáa sær fiskifar, sum so mangir av teimum droyma um. Í dag er fiskiloyvið tann størri parturin av kostnaðinum, um menn hugsa um at keypa egið skip.

Vit kenna gongdina úr Íslandi, har nógv flestu loyvir, eftir hondini, sita á fáum hondum og spekulantar liva av at selja av hesum loyvum.

Nei, óbrúktir fiskidagar og loyvir, eiga at fella aftur til landi, og ikki enda sum søluvøra hjá einstaklingum. Hetta má steðgast. Verji fólksins ogn. Tað gert tú við at velja Javnaðarflokkin tann 20 januar.

# Heimarøktin og nýggi bygningurin hjá Landssjúkrahúsinum!

**Ása Olsen**
*valevni hjá Sjálvstýrisflokkinum í Suðurstreymoy*



Nú nýggi bygningurin á Landssjúkrahúsinum verður tikin í nýtslu fyrst í hesum árinum, er ætlanin, at fara meir og meir yvir til, at viðgera sjúklingar ambulant.

Tá hettar hendir, kemur sjálvandi bæði størri trýst at liggja á Heimarøktini, samstundis sum ein fær bæði størri og truplari avbjóðingar enn nú.

Sum øllum kunnugt, hevur verið trupult at halda játtanina við verandi skipanum, so at um ikki játtanin verður hækka svarandi til tær øktu avbjóðingarnar, er greitt, at tað koma at verða tænastur innan Heimarøktina, ið koma at detta burtur.

Tá talan er um tey bleytu virðini so sum Heimarøkt, sjúkrahús o. a., er umráðandi at velja umboð inn á ting, ið sjálvi starvast innan økið, og tí vita hvar veruligi trupulleikin er, og hvussu hann kann loysast.

Tað nyttar onki at koma við eini ørgrinnu av vallyftur uppundir val, tí at tey seinastu tvey árini hava víst, at eldraøki enn einaferð hevur verið fyri vanbýti, og at vallyftini bert rukku til valið var av.

Vit hava skyldu til at tryggja okkara gomlu eitt virðiligt lívskvøld, og er tað nakað eg sum valevni Sjálvstýrisfloksins vil arbeiða fyri.

# Tilboð til ung yvir átjan ár

**Finnur Helmsdal**
*tjóðveldisflokkurin*



Vit hava havt barnaforsorgarlóg síðan 1960, og nú er ein spennandi dagførd og víðkað útgáva á trappuni. Barnaforsorgarlógin tekur tó bert atlit at børnum og ungum sum hava trupulleikar og sum eru upp til 18 ár. Eingin serskild lóggáva er fyri somu børn og ung, tá tey fara um tey átjan árini. Hetta hóast tey og familjur teirra eru í júst somu støðu. Tí eiga vit at lóggeva soleiðis, at samfelagið bjóðar ungum við trupulleikum, og sum eru blivin átjan, tilboð viðvíkjandi ymiskum viðkomandi og átroðkandi viðurskiftum. Tilboð um bústað er kanska mest átroðkandi. Tó eru tilboð um útbúgving, arbeiði, stuðul og ráðgeving av grundleggjandi týdningi fyri hesi ungu, sum so ella so hava fingið eina ringa byrjan men sum meira enn so kunnu koma aftur á beint, bert vit eru viljað at stuðla teimum. Sum er, verða hesi ungu viðgjørd og viðfarin eins og øll onnur, ið gerast átjan. Og tað er ikki altíð nøktandi hjá einum, sum er viðbrekin og tí hevur serligan tørv.

# Vit taka tónleikin í álvara

**Musikskúlin skal eisini styrkjast, fyri at fáa eitt enn betri tilboð til ríka tónleikalívið í Føroyum. Tað hevur Javnaðarflokkurin gjørt sær greitt. Tí hava vit eisini sett hetta beinleiðis í valskránna.**

**John Johannessen**
*Valevni Javnaðarfloksins í Suðurstreymi*
*john@jokarin.com*



Jú, vit skulu geva tónleikinum C-vitaminir! Poptónleikur er eisini tónleikur. Tí vil Javnaðarflokkurin framvegis skapa ein møguleika fyri at stuðla ungum, evnaríkum tónleikarum, sum vilja royna at koma út um landoddarnar við sínum tónleiki. Eisini popptónleiki.

Hetta sjálvt, um tað annars so virðiliga tónaskaldið, Sunnleif Rasmussen, í grein á internet Dimmu, og helst eisini í bløðunum, kallar slíkan tónleik fyri døgnflugutónleik og hevur hug at rokna hetta slagið av tónleikarum, fyri at vera á einum mentanarligum síðuspori. Teit Lassen, Eivør Pállsdóttir, Guðruna Sólju Jacobsen og Týr, halda vit ikki vera á einum mentanarligum síðurspori. Vit virða tey í øllum førum og halda, at slíkur tónleikur eisini er list.

Tí vilja vit eisini stuðla hesari listini. Tað koyrir ikki landið á húsagang. Men skapar ein nýggjan vinnumøguleika.

**Styrkja musikkskúlan**

Góð útbúgving skapar dugnasemi. Soleiðis er eisini við tónleikinum. Tí hevur Javnaðarflokkurin samsundis sett sær sum endamál at styrkja musikskúlan.

Musikskúlin hevur gjøgnum árini verið ógvuliga mennandi fyri ungdómin, og harvið fyri tónleikalívið í Føroyum.

Men eisini í musikskúlanum er orkan avmarkað. Millum annað av fíggjarligum ávum. Hetta vil Javnaðarflokkurin gera nakað við, fyri at fáa pláss fyri so nógvum næmingum, sum gjørligt. Og eisini fyri at skapa ein so góðan musikkskúla, sum gjørligt..

Endamálið við mentanarpolitikkinum á tónleikaøkinum má vera at geva teimum ungu so góða tónleikaliga útbúgving, so góðan førning, sum yvirhøvur gjørligt.

Hetta skapar okkum í seinna enda veruliga listarliga virðing úti í heimi. Soleiðis skrivaði Sunnleif Rasmussen eisini í sínari grein. Og eg eri púra samdur við honum. Men fyri tað er tað ikki skeivt, eisini at stuðla poptónleikarum.

Sunnleif Rasmussen vil hava: "Munagóðan stuðul til tónlistarliga menning og harvið dygd, heldur enn døgnflugukendan løtuvinning!"

Javnaðarflokkurin er samdur. Tí løgdu vit fram broytingaruppskot til fíggjarlógina fyri 2001, um at játta musikkskúlanum 950 túsund krónur eyka. Hetta uppskotið fingu vit samtykt. Og tað gjørdi stóran mun hjá musikskúlanum.

Javnaðarflokkurin vil geva tónlistini munagóðan stuðul til listarliga menning og dygd. Tí settu vit eisini uppskot fram á ting í 1999, um at stuðla tónleikarum at fáa møguleikan at vinna marknað uttanlands. Hetta fyri at breiðka føroyska vinnugrundarlagið, til eisini at fevna um tónleik. Men tað bleiv felt av samgonguni millum Fólkaflokkin, Tjóðveldisflokkin og Sjálvstýrisflokkin.

Gev tónleikinum C-vitaminir. Atkvøð fyri lista C 20. januar.